# – Uttan hjálm kann eg bróta høvdið

**Sjey ára gamla Ella Káradóttir heldur, at hjálmurin er cool. Gjáramorgunin fekk hon ein hjálm frá Ferðslutrygd, og nú eigur hon tríggjar**

FERÐSLUTRYGD
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Havn:** Við strúkandi ferð skundar Ella sær avstað á tí slætta gólvinum. Her er vítt um at fara inni í tí stóra pakkhúsinum.

Her eru ymiskar forðingar settar upp, soleiðis at hon kann fara millum hesar, samstundis sum hon skal ansa eftir ikki at fara út um frámerkini í gólvinum Hon er á rulluskoytum – og hon hevur sjálvandi eisini hjálm á høvdinum. Fyri hana er tað at hava hjálmin uppi á høvdinum ikki óvanligt, tí tað ger hon altíð.

– Tá eg súkkli ella tá eg eri á rulluskoytum, brúki eg altíð hjálm. Og tað eeer cool, sigur sjey ára gamla Ella við eftirnavninum Káradóttir, og sum er úr Hoyvík.

Saman við 279 øðrum børnum var hon eisini við til tiltakið hjá Ferðslutrygd fyrrapartin í gjár.



### Fær øgiliga ilt

Ella gongur til dagligt í 1. flokki í Hoyvíkar skúla. Og tá hon frætti um tiltakið hjá Ferðslutrygd varð hon øgiliga spent.

Hon fekk at vita, at har skuldi ymiskt spennandi verða á skránni, m.a. skuldi TrøllaPætur og Omman vitja, og so skuldu tey eisini syngja nógv.

Umframt alt hetta so skuldu børnini eisini fáa ein hjálm frá ferðslutrygd – genturnar ein reyðan og dreingirnir ein bláan.

Hvat tey í hennara flokki hava lært um ferðslu og ferðslutrygd, er ilt at siga. Men Ella var kortini fult greið yvir, at ein eigur at brúka hjálm.

– Brúkar man ikki hjálm, so kann man bróta høvdið, um man dettur ella smekkar seg í.

– So fær ein eisini øgiliga ilt, og so kann blóð koma úr høvdinum, sigur Ella, sum longu hevur staðið á rulluskoytum eina góða løtu inni í stóra pakkhúsinum.

### Er cool

Ellu dámar sera væl at súkkla og at standa á rulluskoytum, saman við vinkonunum.

Tá hon ger tað, fer hon altíð í hjálmin – ella hjálmarnar, tí hon eigur í roynd og veru tveir hjálmar frammanundan heima við hús.

Hóast hon altíð brúkar hjálm, so hevur hon higartil verið heppin, tí hon er enn ikki dottin, meðan hon hevur súkklað ella hevur staðið á rulluskoytum.

Men hóast tað, ætlar hon framvegis at brúka hjálmarnar – og eisini tann nýggja reyða, sum hon í gjáramorgunin fekk frá Ferðslutrygd.

– Eg haldi, at hjálmurin er cool. Og tað halda vinkonurnar hjá mær eisini, sigur Ella.

*– Eg haldi, at hjálmurin er cool. Og tað halda vinkonurnar hjá mær eisini, sigur sjey ára gamla Ella úr Hoyvík*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# 280 hjálmar til børnini

**Ráðið fyri Ferðslutrygd skipaði aftur í ár fyri serstøkum degi fyri børnini í 1. flokki.**

FERÐSLUTRYGD
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Havn:** 280 børn kunnu halda ein øgiligan gang. Men tey kunnu sanniliga eisini vera still, tá okkurt serligt er á skránni.

Og tað var tað fyrrapartin í gjár, tá Ráðið fyri Ferðslutrygd skipaði fyri hjálmastevnu fyri 1. flokk.

Her var bæði sangur, súkklukapping, súklurás, pylsur og sangur og mangt annað á skránni.

Men tá so vitjanin av TrøllaPæturi og Ommuni var á skránni lurtaðu børnini sera væl eftir, og sungu tess harðari við, tá tey vóru biðin um tað.

Tiltakið varð hildið í einum av pakkhúsunum hjá Skipafelagnum í Havn, har allir næmingar í 1. flokkunum í Føroyum vóru bodnir við.

Hetta pakkhúsið var í gjár karmur um hetta afturvendandi tiltakið hjá Ferðslutrygd við heitinum »Hjálmur er cool«. Í sambandi við hetta fáa øll børnini hvør sín súkkluhjálm.

*280 børn úr øllum landinum vóru savnað í gjár til árliga ferðslutiltakið hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd. Á tiltakinum fingu tey øll hvør sín hjálm*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



## Hissinisøla aftur á skránna

**Klaksvík:** Fyri gott einum ári síðani, skipaði Útoyggjafelagið fyri einum fundi í býráðshøllini í Klaksvíkar har málið var, at skipa eina »hissinisølu«, eisini nevnt eitt sølutorg í Klaksvík.

Endamálið við hesum var, at fólk av útoyggj kunnu koma t.d. leygarmorgun við vørum at selja á torginum. Á hissinisøluni skal, umframt vørur frá útoyggj, eisini vera gjørligt at keypa fisk, heimavirkaðir lutir og annað. Útoyggjafelagið hevur nýliga havt fund við Klaksvíkar kommunu, har hetta málið var tikið upp av nýggjum.

Semja var millum partarnar um, at ein skal arbeiða málrættað fram ímóti at fáa hetta tiltakið framt so skjótt sum til ber.

Enn eru nøkur praktisk viðurskifti sum skulu avgreiðast, áðrenn endalig støða verður tikin til hvar Hissinisølan skal staðsetast, verður sagt frá Útoyggjafelagnum.

**sb.**

## 1.400 tons av pappíri

**Rusk:** Móttøkan av pappíri til endurvinning vaks munandi í fjør, vísir ein uppgerð frá IRF.

Mesti vøksturin kom av, at Tórshavnar Kommuna eisini fór skipa fyri innsavning av pappíri til endurvinning. Samlaði útflutningurin av pappíri og pappi var góð 1.400 tons í 2004. Sama ár vóru góð 3.700 tons av jarni og metali flutt til Jarnmóttøkuplássið hjá Tórshavnar Kommunu.

IRF fór í holt við innsavning av pappíri og pappi frá húskjum og virkjum miðskeiðis í 2001, og fyrst í 2004 byrjaði Tórshavnar Kommuna at savna pappír inn frá húskjum.

IRF og Tórshavnar Kommuna hava gjørt avtalu um, at IRF tekur ímóti pappíri og pappi frá Tórshavnar Kommunu. Hetta hevði við sær, at nøgdin av móttiknum pappíri serliga frá húsarhaldum øktist úr góðum 2.600 rúmmetrum í 2003 til slakar 4.900 rúmmetrar í 2004.

Tórshavnar Kommuna byrjaði ikki skipaða innsavning av pappi frá virkjum fyrrenn í fjør. Móttikna nøgdin av pappi øktist tí lutfalsliga minni, frá sløkum 9.600 rúmmmetrum í 2003 til góðar 13.000 rúmmetrar í 2004. IRF útflutti harvið góð 1.400 tons av pappíri og pappi í 2004 og var hetta ein vøkstur uppá góð 57% í mun til 2003.

– Søluprísurin fyri pappír og papp í 2004 javnvigaði við flutningskostnaðin av landinum, sigur IRF.

**sb.**

*Báðar brennistøðirnar hava nógv at brenna – og nøgdirnar eru vaksandi*
*(Mynd: IRF)*

